## Skálafossur hevði 17.330 pund

Skálafossur hevur trolað á Skeivabanka, nú teir komu inn at landa mánamorgunin. Sambært Sandoyarportalinum hevði skipið álagt ein minstaprís uppá 22,12 krónur, og skuldi tað geva 191.659 krónur fyri alla nøgdina. Skálafossur, ið er úr Vestmanna, var til fiskiskap í eina viku.



## Endurtaka djóradagarnar í Hovi

Djóradagarnir, sum vóru fyriskipaðir í Hovi í fjør, eydnaðust so mikið væl at tiltakið verður endurtikið í døgunum 15. og 16. mai. Tað er Suðuroyar Hestafelag, sum skipar fyri djóradøgunum. Sagt verður, at um fólk hava djór, sum tey ynskja at vísa fram, kunnu tey venda sær til Suðuroyar Hestafelag á tlf. 218821.




*Ynskini eru nógv, men peningur er ikki til at seta øll arbeiðið í verk, sum heimasandsfólk kundu ynskt sær. - Vit klára okkum við tí sum vit hava, sigur borgarstjórin, Brandur Sandoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Arbeiða við tí sum vit hava

**Fíggjarstøðan hjá Sands kommunu kundi verið betri. Men roynt verður at húsast við teirri inntøkuni, sum kommunan fær inn í skatti. - Jú, ynskilistin er stórur, men vit fáa sum er, bert gjørt ein part av tí sum vit kundu ynskt okkum, staðfestir borgarstjórin, Brandur Sandoy**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandur:** Tað vóru tær tíðir, tá nógv arbeiði var knýtt at stóra havnalagnum í bygdini.

Fleiri skip landaðu fast á Sandi, og á flakavirkinum var arbeiði til nógvar virkisfúsar hendur. Og alt andaði av bjartskygni.

Í dag er støðan nógv broytt, og gólvini á flakavirkinum eru fyri tað mesta turr.

Hóast inntøkurnar hjá kommununi ikki eru minkaðar so øgiliga nógv tey seinastu árini, ber illa til hjá kommununi at seta alt tað í gongd, sum tørvur er á.

- Jú, tað hevði sjálvandi verið betri, um vit áttu fleiri milliónir á bók og høvdu stórar inntøkur. Men vit klára okkum kortini við tí sum vit hava, slær Brandur Sandoy fast.

Ein av ætlanunum sum eftir ætlan skal setast í verk í næstum, er upplatingin av bókasavninum. Og gongst sum ætlað, verður rættiliga skjótt farið undir at betra um tilboðini til barnaansing.

- Vit kundu sjálvandi ynskt okkum ein nýggjan barnagarð og møguleikan at fara undir størri útstykkingar. Men beint nú loyvir fíggjarstøðan ikki hesum, sigur borgarstjórin.

### Fyrimunur

Á Sandi eru ikki tey nógvu arbeiðsplássini. Her eru m. a. handlar, barnagarður, ellisheim, skúlar, bóndur og handverkarar og annað.

Í síni tíð var flakavirkið á Sandi álitið hjá mongum heimum, men soleiðis er ikki longur.

- Nei, tíverri er ikki tað nógva arbeiðið har í dag. Tað er nakað at gera, tá ein bátur kemur at landa, men síðani verður veiðan koyrd til Skopunar at skilja, greiðir Brandur Sandoy frá.

Tíbetur vísir tað seg, at fleiri fólk av Sandi hava arbeiði í Skopun. Og hetta er so aftur til fyrimunar fyri inntøkurnar hjá Sands kommunu.

Júst hetta við inntøkuni er ein søga fyri seg: Hóast niðurgangstíðir eru í samfelagnum, er inntøkan hjá kommununi ikki lækkað so øgiliga nógv, - men hon er so heldur ikki hækkað tað stóra!

Sambært Brandi Sandoy hevur hetta sína natúrligu frágreiðing:

- Í teimum góðu tíðunum, tá hækkaði skattainntøkan ikki so nógv. Og tí kanst tú siga, at vit fingu fyri sovítt ikki lut í teimum góðu tíðunum.

- So nú, tá tað gongur niður á bakka, stendur inntøkan at kalla í stað!

### Avdrøg

Ein kommuna á støðd við hana á Sandi, eigur altíð at tryggja sær at inntøkur og útreiðslur fylgjast.

Í ár javnvigar fíggjarætlanin soleiðis við 13 mió krónum, og er tað á leið tað sama sum í fjør.

Ein vansi við fíggjarpolitikkinum og íløgunum hjá kommununi er, at skuldin er so stór.

Sum áður nevnt, eru ynskini nógv, men peningurin ikki til staðar.

- Ja, skuldin er so stór sum tvær álíkningar. So tú skilir, at her fer nógvur peningur at gjalda avdrøg við, staðfestir Brandur Sandoy.

> *Eg tori ikki at siga, hvussu verður við inntøkuni í framtíðini. Tað er alt treytað av, hvussu tað annars gongur í samfelagnum*

## Arbeiðsloysi veksur

Eins og so nógva aðrastaðni eru rættiliga nógv fólk rakt av arbeiðsloysi á Sandoynni.

Sambært nýggjastu tølunum frá Hagstovuni er arbeiðsloysið á Sandoynni farið at tátta í sjey prosent, og er hetta væl yvir miðaltalið fyri landið.

Hetta hevur sjálvandi sína ávirkan á inntøkugrundarlagið hjá kommunu.

- Nei, eg tori ikki at siga, hvussu verður við inntøkuni í framtíðini. Tað er alt treytað av, hvussu tað annars gongur í samfelagnum, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri á Sandoy.